


*ANE LAN (N): "Amerika" - video (2003)*

æt tá. Eg hitti ein fittan ungan mann úr hesum fjarlagda landi, og hann tosaði franskt sum ein prestur og betri málskúla fekk eg ikki, serliga tí hann ikki dugdi serliga væl enskt, sum eg var rættiliga køn í. Vit reikaðu um í París tað mesta av frítíðini og kanska væl tað, og satt at siga helt eg meg vera komna í annan heim, tí hvat eru Skálatún samanborin við Montmartre? Her vóru ongi bygdafrell, og eg royndi at skjóta bygdarhamin av mær og spældi verðinskona. Ein dagin fóru vit at vitja eina fastur hansara, sum búði mitt í býnum, og sum eg skilti, so vóru hesi fólkini múgvandi, tey høvðu sent drongin til París at ganga í studentaskúla, so hon var neyvan hvør Hanus og Janus hendan fastirin. Hon var blíð og bjóðaði drekka í køkinum og hvat var tað fyrsta eg fekk eygað á? Voksdúkin, hann var sama slag sum okkara, enntá eisini eitt sindur holutur har knívurin var gloppin! Hvør segði bygdafrell? Kanska hevur konan úr Persia eisini eina ferðina skrivað sum eg í lesibókina, kanska eru vit øll bygdafrell og kanska er tað bara soleiðis, tað er?

● ● ● ●

# PRO – VINCERE

*Summarliði R. Ísleifsson*

Orðið provins kemur úr latíni – provincia. Pro- kann merkja løn ella samsýning, og vincere merkir at vinna á. Provincia eitt landøki, rómverjar høvdu lagt undir seg. At ráða her settu teir ein umboðsmann, ið ofta fekk hetta í løn fyri góða tænastu. Hetta hugtakið, provins, er søguliga knýtt at valdi, at onkur hevur vunnið á onkrum øðrum. Valdið er í miðdeplinum, metropolinum, avger viðurskiftini hjá teimum í provinsini.

Som so mong onnur hugtøk, hava provins og provinsialstur onga meining uttan eina mótsetta síðu. Um eingin metropolur ella sentrum er, so er heldur eingin provins. Í fyrstu atløgu kundi verið hildið, at sambandið millum hesi bæði er einfalt og greitt: Metropolurin við sínum valdi skipar provinsina í síni egnu sjálvsmynd. Ein diskursur kemur í um økið, ið fyrst og fremst er formaður av valdinum, ein diskursur, sum kann tykjast at lýsa tað, men sum í veruleikanum mest er ein tilgering, bygd á egnar fortreytir. Ofta verður ein slík lýsing merkt av "starry-eyed exotism" ella "wholesale denigration and inferioization" sum ein granskari hevur sagt.

Ótald dømi eru um, at metropolurin niðurmetur útjaðaran sum gamaldags, ómentaðan og tápuligan. Eitt nú í teimum mongu ferðafrásagnunum úr Íslandi upp til 1700-talið og miðjuna í 1800-talinum. Ofta verður íslendingurin lýstur meira líkur dýri enn fólki, sagt verður, at hann át sum dýr, gekk ílatin sum dýr, búði undir jørðini sum dýr og nørdist sum dýr.

Men sambandið millum metropol og provins er tíbetur meira samansett sum so. Fleiri dømi eru eisini um, at metropolurin hevur jaligar metingar av provinsini, at har eru varveitt virðir, ið eru mist í miðdeplunum. Eitt gott dømi um hetta er tað skifti í meting um íslendingar, ið sæst út í 1800-talið. Meira og meira gerst Ísland eitt stað, har tey germansku og norðurlendsku mentanarminnini eru best varðveitt, og har frummegin í náttúruni er meira sjónlig enn aðrastaðni í heiminum. Ytsti útjaðarin, Ísland, gjørdist enntá eitt týðandi evni í samfelagskjakinum í Vestureuropa seinnu helvt í 1800-talinum og fyrru helvt í 1900-talinum. Intellektuell og politikarar í Miðeuropa, Onglandi og Skandinavia "brúktur" íslendska fornøld, miðaldarmentan og bókmentir til at undirbyggja "national claim to superiority"; granskarin Brian Dolan hevur í bók síni Exploring European Frontiers, grundgivið fyri at nakað tað sama er hent í kjakinum um Grikkaland og klassisku fornøldina hjá granskarum og ferðandi úr Vestureuropa í 1800-talinum. Hóast hetta skifti í metingum fyri tað mesti bygdi á fortreytirnar í metropolinum fekk tað stóran týdning fyri provinsina Ísland. – Á sama hátt sum metingarnar í miðdeplinum um útjaðaran eru tvíbýttar, er útjaðarin eisini tvíbýttur mótvegis metropolinum. Ofta eru hesar metingar neiligar – funnist verður at valdsarrogansu og stoltleika. Hinvegin síggjast eisini virðingarfullar myndir at metropolinum, hansara prýði verður tikið til og mótin er fyrimyndarligur.

Sambandið millum metropol og provins er tí ikki eitt einfalt fyribrigdi. Rætt er, at úr útjaðaranum kom fiskur, skinn, hvalatonn, ull og kjøt. Tað er eisini rætt, at metropolurin ásetti reglur og trúgv, skikkir og siðir, móta og meiningar, ið útjaðarin skuldi taka við og fylgja. Men har hevur eisini verði orðaskifti millum útjaðara og miðdepil. Í íslendska førinum kann sigast, at søguskrivarin Arngrímur Jónsson var upphavsmaður til hetta "writing back", fyri at nýta hugtakið hjá Salman Rushdie um kjakið millum metropol og provins. Royndin hjá Arngrími fekk kanska ikki so stórt árin fyrr enn nógv seinni, og ikki fyrr enn í 1800-talinum ber til at siga, at miðdepilin fór at taka atlit til útjaðaran Ísland: at meira var at finna í Íslandi enn fiskur og svávil, og tað var jú eitt meira áhugavert evni hjá teimum dannaðu í Europa; "Of Yseland to wryte is litill need" hevði leingi verið vanligt at siga um Ísland. Men frá miðjuni í 1800-talinum ber til at siga, at landið fær ávísa viðurkenning í metropolunum í grannalondunum. ikki minst viðvíkjandi bókmentum og mentan, og farið verður at gáa um "brævið" úr Íslandi.

Eftir orðabókini er ein provinsialistur ein, ið býr í útjaðaranum, men eisini ein, ið stuðlar kravinum hjá boheminum í provinsini um rættvísa viðferð. Provinsialisma er sostatt tað at búgva í provinsini, men tað kann eisini merkja av vera snævurskygduir og gamaldags. Og tað kann provinsialisma væl vera, hon kann vera uttan samljóð við tíðini og full av ótta fyri øðrum, bæði næstu grannum og fyri metropolum. Men provinsialisma kann gott vera tað, at geva tí serstaka pláss, einum øðrum sjónarmiði, einum alternativi. Um provinsin skal fáa atgongd til metropolin krevur hetta dirvi og initiativ, eitt eyka tak, t.d. at læra onnur mál til samskifti við aðrar mentanir. Í metropolunum halda tey ofta, at hetta er ikki neyðugt, men tað er ein av mongum fyrimunum, provinsin kann hava fram um metropolin.

Voestermans, Paul, "Alterity/Identity: a Deficient Image of Culture". Alterity, Identity, Image, Selves and Others in Society and Scholarship. Ed. Raymond Corbey og Joep Leerssen. Amsterdam 1991, 221–222.

Dolan, Brian, Exploring European Frontiers. British Travellers in the Age ofEnlightenment. London 2000, 126, 179.

Wawn, Andrew, The Vikings and the Victorians. Cambridge 2000, 10, 17.

● ● ● ●